Høvdið á blokkin

Leiðarar innan politikk og búskap verða við, tá Norðuratlantsbólkurin skipar fyri stórari ráðstevnu um føroyskan búskap á Christiansborg 25. mai, sum Norðuratlantsbólkurin skipar fyri

RÁÐSTEVNA
Tíðindaskriv

Tað, sum verður viðgjørt á ráðstevnuni, verður m.a.: Gongdin í íslendskum búskapi eftir at landið gjørdist sjálvstøðugt; gongdin í føroyskum og grønlendskum búskapi í løtuni; politiska hugsanin undir blokkstuðulsskipanini; peningarenslið millum Danmark og Grønland/ Føroyar; búskaparligi týdningurin av strategisku støðu Føroya og Grønlands; gjaldoyrafelagsskapur ella nýggj gjaldoyru; nýggir vinnumøguleikar í Føroyum og Grønlandi.

Tey, sum fara at leggja fram, verða m.o.: Thorvaldur Gylfason, professari í búskapi á Reykjavíkar Universiteti; Bodil Nyboe Andersen, Tjóðbankastjóri í Danmark; Jørn Astrup Hansen, stjóri í Føroya Banka; Hermann Oskarson, formaður í Búskaparráðnum; Tróndur Djurhuus, umboð fyri tiltakið Bitland; Marianne Jelved, formaður í Radikala flokkinum og fyrrv. danskur búskaparmálaráð-harri; og Frank Jensen, framsøgumaður danska Javnaðarfloksins og fyrrv. danskur løgmálaráðharri.

Ráðstevnan verður í felagssalinum á Christiansborg týsdagin 25. mai frá kl.9.00 til 17.00. Øll eru vælkomin, men áhoyraraplássini eru avmarkað.

Tilmelding fer fram hjá Norðuratlantsbólkinum, Lotte Symes, á e-mail adressuni: lotte.symes@ft.dk eller við brævi til: Den Nordatlantiske Gruppe, Folketinget, Christiansborg, DK-1240, København K. Danmark.

Freistin at melda til at mikudagin 21. mai.

Sølustevna í Runavík um vikuskiftið

Við góðum undirhaldi og einari rúgvu av framsýnarum bjóðar NSÍ um vikuskiftið til stóru sølustevnuna Lýsing '04 í ítróttarhøllini í Runavík. Hetta er fyrstu ferð, at felagið skipar fyri hesi sølustevnuni

SØLUSTEVNA
tíðindaskriv

Lýsing '04 letur upp leygardagin 15. mai klokkan 14, og ein tíma seinni fer borgarstjórin í Runavík, Rodmundur Nielsen, at seta sølustevnuna. Sunnudagin 16. mai letur stevnan upp klokkan 15, og báðar dagarnar er opið til klokkan 22.

Her verður høvi hjá teimum vitjandi at síggja eitt fjølbroytt úrval av básum, ið framsýnararnir leggja stóra orku í at gera snotiligar og innbjóðandi, umframt felags fyri allar framsýnararnar er, at teirra bestu tilboð, tænastur og vørur kunnu upplivast á sølustevnuni.

Sum vanligt ber alla tíðina til at keypa sær ein drekkamunn og okkurt gott afturvið, um brúk er fyri at seta seg niður eina løtu, áðrenn farið verður víðari at vitja teir næstu básarnar.

Yvirhøvur minnir Lýsing '04 sera nógv um Markosølustevnurnar, sum NSÍ tey seinnu árini hevur skipað fyri um mánaðarskifti november-desember. Men av tí at fleiri hava ynskt eina sølustevnu ta ljósaru tíðina eisini, hevur felagið eisini tikið stig til Lýsing '04.

Talan verður eisini um tiltøk fyri børnini báðar dagarnar, sum sølustevnan varar

Fleiri av framsýnarunum á sølustevnuni eru klæðnahandlar og tí verður skipað fyri einari stórari mótasýning hvønn dagin. Hesa ferð eru mótasýningarnar klokkan 19 báðar dagarnar, og har ber so til at kunna seg um aktuella klæðamótan.

Nógv hendir á pallinum

Tað eru tó ikki bara móti og klæði, ið kunnu upplivast á pallinum hesar báðar dagarnar, tí tað hevur eydnast okkum at sett saman eina spennandi skrá við hópin av undirhaldi, ið bæði vendir sær til børn, ung og vaksin.

Nakað er fyri børnini báðar dagarnar klokkan 17.30. Leygardagin kunnu tey gleða seg til klovnarnar Kaktus og Albinus, og sunnudagin fara Glotti & Gleimur at borðreiða við búktaling, gykli og øðrum kynstrum.

Tónleikurin eigur eisini sín part, og klokkan 16 báðar dagarnar eru tónleikaframførslur. Leygardagin ber til at hoyra Nes Sóknar Musikkfelag, sum júst hevur verið á musikkstevnu í Vestmanna, og sunnudagin fer Kári Sverrisson at syngja og spæla.

Aftur um kvøldið, klokkan 20.30, eru tónleikaframførslur á skránni. Bólkurin Salt, ið júst er afturkomin av væleydnaðari konsertferð í Skotlandi, verður at hoyra leygarkvøldið, og sunnukvøldið fer Eivør Pálsdóttir at seta prikkin yvir i'ið við einum brotparti av tí nógva, hon hevur á síni kendu og góðu sangskrá.

Umframt alt hetta, so eru atgongumerkini eisini samstundis lutaseðlar, ið fevna um vinningar frá framsýnarum og góðar ferðir við Norrønu. Bæði kvøldið verður drigið klokkan 21.45, leygarkvøldið millum atgongumerkini tann dagin og sunnukvøldið millum atgongumerkini báðar dagarnar.

Frítíð og ferðavinna í SMS

Frá hósdegnum 13. til leygardagin 15. mai fer SMS, saman við fimm fyritøkum, sum eru knýttar at ferðavinnuni, at varpa ljós á fyribrigdini frítíð og ferðavinna

FERÐAVINNA
Tíðindaskriv

Tær fimm fyritøkurnar, sum luttaka á framsýningini á Torginum í SMS nevndu dagar, fara at vísa fram og selja ferðir í Føroyum, og til og í útlandinum. Í upprunaliga ætlanakkanum fyri árið hevði SMS ætlanir um slíkar evnisdagar. Tó varð ikki endaliga avgjørt, hvussu framsýningin skuldi skipast, og hvør skuldi bjóðast við. Tá ið ein fyrispurningur kom frá Ferðaráð Føroya, um at nýta Torgið til kunnandi tiltak um ferðavinnuna í Føroyum, og at ferðast í Føroyum, fullu brikkarnir upp á pláss. Avgjørt varð, at málið við framsýningini skuldi verða, at nøkta tørvin hjá øllum ferðandi á einum og sama stað. –Ynskt varð nevnliga, at á framsýningnin skuldu umboð fyri ferðavinnuna í Føroyum; t.e. kunningarstovur og ferðamál kring landið, og fyri tey, sum selja ferðir úr Føroyum og í útlandinum, t.e. ferðamannastovur og flogfeløg, verða við.

Nú framsýningin letur upp hósdagin hevur tað eydnast at røkka málinum. Tað hevur nærum eydnast at savna alla ferðavinnuna í Føroyum undir einum og sama takið. Ferðaráðið, sum umboðar kunningarstovurnar kring landið og teirra lokalu áhugamál, hevur ein stóran bás. Á básinum fara tey at kunna tey vitjandi um ferðamál í Føroyum. Annars liggur upplýsandi faldari frá Ferðaráðnum í miðsíðunum í SMS blaðnum hesaferð. Umframt Ferðaráðið verða Maersk Air, Smyril Line, Atlantic Airways og MB Tours, sum allir selja ferðir úr Føroyum og í útlandinum, við á framsýningini. Teir hava allir minni básar, har teir fara at kunna um ferðamál í útlandinum.

Framsýningin letur upp hósdagin 13. mei kl. 10.00 og er opin til kl. 17.30. Fríggjadagin er opið til kl. 18.30 og leygardagin til kl. 14.00. Hvønn dag, umleið hálvan tíma áðrenn latið verður aftur, verður drigið millum innkomnar svarlepar í stóru kappingini, sum fer fram ísambandi við framsýningina. Leygardagdrúttin, drigið ímillum teir svarlepar, sum vit hava fingið allar tríggjar dagarnar framsýningin hevur verið. Vinningarnir í hesum dráttinum eru flogferðaseðil fyri tvey við Maersk Air til Danmarkar, flogferðaseðil fyri tvey frá Atlantsflogi til eitt av teirra ferðamálum, gávukort á kr 2.000,- frá Ferðaráð Føroya at nýta til gisting, útferðir ella líknandi, sum Kunningarstovurnar kring landið skipa fyri, eitt gávukort á kr. 3.000,- frá MB Tours og ein ferð fyri tvey vaksin og tvey børn við bili til Hanstholm og aftur við Norrønu. Umborð verður gist á 4 koyggjukamarið við wc og bað.

Dagvinningarnir eru hesir:

Hósdagin 13. mei: gávukort á 1.000,00 frá Ferðaráð Føroya at nýta til gisting, útferðir ella líknandi, sum Kunningarstovurnar kring landið skipa fyri, flogferðaseðil frá Atlantic Airways til eitt av teirra ferðamálum og ein mini-cruise ferð fyri tvey til Bergen og aftur við Norrønu í 2-koyggjukamari (innv.) við wc og bað

Fríggjadagin 14. mei: gávukort á 1.000,00 frá Ferðaráð Føroya at nýta til gisting, útferðir ella líknandi, sum Kunningarstovurnar kring landið skipa fyri, flogferðaseðil frá Atlantic Airways til eitt av teirra ferðamálum og ein mini-cruise ferð fyri tvey til Bergen og aftur við Norrønu í 2-koyggjukamari (innv.) við wc og bað

Leygardagin 15. mei: gávukort á 1.000,00 frá Ferðaráð Føroya at nýta til gisting, útferðir ella líknandi, sum Kunningarstovurnar kring landið skipa fyri og ein flogferðaseðil frá Atlantic Airways til eitt av teirra ferðamálum

Á Torginum frá hósdegnum 13. til leygardag 15. mei.

Skráseta staðarnøvn í Sandavági

Arbeitt verður við at skráseta øll staðarnøvn í Sandavágs Kommunu. Arbeiðið er komið væl áleiðis, og ætlanin er at geva úrlsitið út í bók og møguliga eisini elektroniskt

STAÐARNØVN
Edvard Joensen

Sandavági: Staðarnøvn í Sandavág Kommunu eru seinnu árini savnað og skrásett. Myndir eru tiknar, har nøvnini eru fest á, og ætlandi verður savnið givið út í bók og helst eisini elektroniskt.

Tað eru teir báðir sandavágsmenninir Jóannes Heinesen og Heini F. Petersen, sum hava gjørt hetta stóra arbeiðið. Á samkomu í Sandavági mikukvøldið løgdu teir úrslitið fram fyri heimildarfólki og øðrum.

Hetta er stórarbeiði, teir báðir hava gjørt. Og tað er ikki løtuverk heldur. Tað munnu vera út móti 30 árum, síðan byrjað varð, siga teir. Tó hava teir ikki arbeitt áhaldandi alla tíðina, men havt hetta sum ítriv.

Gjølla eru teir farnir til verka. Hava tosað við eldri fólk í Sandavági og á Slættanesi. Tikið upp á band og goymt. Síðan hava teir fingið myndir og kort frá Matrikulstovuni og eisini privatpersónum, eins og teir sjálvir hava tikið myndir av ymsu støðunum. Nøvn eru so sett á myndirnar, soleiðis at til ber at síggja nágreiniliga, hvar hesi ymsu støðini eru, sum nevnd verða.

Nøvnini eru nógv, teir hava savnað, og ikki er heilt liðugt enn, siga teir báðir, Jóannes og Heini. Sum er, hava teir savnað 1.288 nøvn, men vænta, at tá endaliga liðugt er, fer talið at liggja oman fyri 1.300.

Men staðarnøvnini í Sandavági og á Slættanesi við tilhoyrandi høgum eru ikki bara fest á blað og myndir, uttan eisini skrásett á teldu. Tað er felagið Munin, sum hevur gjørt eina telduskipan, har til ber at leggja slíkt á.

Skalt tú finna eitthvørt navn aftur, ber til at spyrja telduna eftir navninum. So finnist myndin, har navnið er skrásett á. Tú trýstir á prikkin, sum er settur við navnið. Har kemur so fram, hvussu og nær skrásett er, hvør heimildarkeldan er, eins og til ber at fáa eina ella hyli, spurt verður um. Er so einhvør søga ella søgn í samband við hetta staðið, til dømis eitt seiðabergspláss, er tað eisini at finna í skipanini. Og fyri at gera tað heilt livandi, er eisini møguligt at leggja bandupptøkurnar við, so tú á telduni hoyrir hesi gomlu heimildarfólkini greiða frá. Eisini hava teir fingið góðan stúðul og ráðgeving frá Fróðskaparsetrinum, har serliga Eivind Weihe hevur verið hollur í ráðum, siga Jóannes Heinesen og Heini F. Petersen.

Staðarnøvn eru við at hvørva úr gerandisegnum hjá fólki, halda teir báðir sandavágsmenninir. Fyrr var tað ein sjálvsagdur partur av dagliga arbeiðnum, at staðarnøvnini vórðu brúkt. Og tann, sum visti nakað um slík nøvn, segði frá teimum, soleiðis at tey vórðu borin víðari til tey, sum eftir komu.

Nógv staðarnøvn hvørva eisini, so hvørt sum eitt nú bygdirnar vaksa, og menningin breiðir seg. Tí er neyðugt at bjarga teimum, meðan onkur enn er, sum minnist tey. Og ber so til at fáa eina mynd av einum staði, áðrenn ein útgrevstur, ella ein brimgarður verður lagdur, er tað virðismikið at goyma. Hetta er mentanararvur, sum hvørvur, vísa teir báðir, Jóannes og Heini, á.

Millum teirra, sum vóru á samkomuni í Sandavági mikukvøldið, vóru eisini heimildarmenn, sum hava latið upplýsingar til stóra staðarnavnasavnið
Mynd: Edvard Joensen

Jóannes Heinesen og Heini F. Petersen hava í skjótt eitt mannaminni savnað næstan 1.300 staðarnøvn í Sandavágs Kommunu. Støðini eru avmyndað og nøvn sett á myndirnar. Á samkomu í Sandavági mikukvøldið vístu teir arbeiðið fram
Mynd: Edvard Joensen